LM-058/2022

Kommunufelagið

Fíggjarmálaráðið

R. C. Effersøes gøta 30
Telefon +298 302480
Telefaks +298 302481
kf@kf.fo
www.kf.fo

Tórshavn 21. februar 2023

Viðvíkjandi dagføring av skuldarmarkinum hjá kommununum

Áðrenn kommunurnar í 2015 yvirtóku raksturin av eldraøkinum var kommunuskatturin – so at siga – einasta veruliga inntøkukeldan kommunurnar áttu. At áseta skuldarmakið í mun til kommunuskattin, var tí sjálvsagt. Men í sambandi við útleggingina av eldraøkinum broyttist inntøkubygnaðurin hjá kommununum grundleggjandi. Eftirlønarskattur og afturbering eru nú samanlagt næstan helmingurin av inntøkunum í fleiri kommunum. Og í flestu kommunum sunnanfjørðs – har lutfalsliga nógv eldri fólk búgva, og lutfalsliga nógvir borgarar starvast undir serskipanum – stavar umleið ein triðingur av inntøkunum frá eftirlønarskatti og afturbering.

Í sambandi við, at eldraøkið varð eftirmett heittu fleiri kommunur á Kommunufelagið um at reisa málið um at dagføra kommunala skuldarmarkið, soleiðis at tað hóskar til nýggja inntøkubygnaðin. Eisini vístu fleiri kommunur á, at neyðugt verður við stórum íløgum innan eldraøkið komandi árini, og í hesum sambandi verður tað lættari hjá øllum kommunum at luttaka í fíggingini, um skuldarmarkið verður dagført í mun til nýggja inntøkubygnaðin.

Kommunufelagið tekur tí fult undir við ætlanini hjá landsstýriskvinnuni um at taka afturbering og eftirlønarskatt við í útrokning av skuldarmarkinum. Onki verður tó í uppskotinum sagt um, hvussu ein skattaálíking frameftir verður útroknað. Her vil Kommunufelagið mæla til, at hildið verður fast um verandi kunngerð, ið ásetur 23%. Hetta hevur verið siðvenja seinastu 20 árini, og Kommunufelagið sær onga orsøk til nú at fara og broyta hetta. Talan er jú einans um at taka nýggjar inntøkur við í grundarlagið, og tað hevur onki við sjálva skattaálíkningina at gera.

Vegna Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri